## Hevur givið gott avkast

Hóast Trolverkstaðið Bergið telist millum tey smærru í landinum, so er talan fyri tað allar mesta um eina sunna búskapargongd hjá virkinum. Tey tølini, sum vit hava hugt at, ganga aftur til 1999, og hesi sýna eina positiva botnlinju á hvørjum ári. Hartil kemur, at felagið hesi árini hevur fíggjað størsta partin av íløgum umvegis raksturin, sum eisini hevur verið somikið gevandi, at vinningsbýti á til samans 1,441 mió kr. er útlutað seinastu fýra roknskaparárini.

Ein eginogn upp á 3,268 tkr. er kanska ikki so øgiliga imponerandi, men í mun til útlutaða vinningsbýti er talan um sera gott avkast til partaeigararnar, og so skal eisini havast í huga, at fjald virði eisini eru í roknskapinum. Ikki minst tí bygningur felagsins stendur bókaður til eitt virði á 323 tkr. Og sum tað verður nevnt í ársfrágreiðingini, so er handilsvirðið á hesum munandi hægri.

Alt í alt tykist talan tí vera um eitt virki, sum væl kann verða eitt positivt ískoyti til longu sterka raksturin hjá Vónini, sum nú er nýtt móðurfelag. Undan hesum vóru høvuðspartaeigararnir Dan Thomsen, stjóri, og Sp/f 19.06.02, har sami Dan Thomsen er høvuðspartaeigari.

**Sp/f Trolverkstaðið Bergið**

| **Høvuðstøl (tkr.)** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 2.488 | 2.293 | 2.938 | 3.231 |
| Úrslit áðrenn rentur | 718 | 877 | 1.354 | 1.179 |
| Ársúrslit | 519 | 660 | 1.005 | 863 |
| | | | | |
| Støðisogn | 139 | 512 | 678 | 1.167 |
| Ogn í umferð | 4.351 | 3.335 | 4.717 | 4.878 |
| | | | | |
| Eginpeningur | 1.480 | 1.900 | 2.605 | 3.268 |
| Skuld íalt | 3.010 | 1.947 | 2.790 | 2.777 |
| Fíggjarjavni | 4490 | 3847 | 5395 | 6045 |
| | | | | |
| **Lyklatøl** | | | | |
| Ognaravkast | 16 | 23 | 25 | 20 |
| Eginpeningsavkast | 44 | 43 | 49 | 33 |
| Soliditetur | 33 | 49 | 48 | 54 |
| Gjaldførislutfall | 160 | 237 | 217 | 225 |
| | | | | |
| **Starvsfólkatal** | 6 | 5 | 5 | 6 |

# ð er nú partur av Vónin Group




*Trolvirkið Bergið, sum liggur dygst við bryggjkantin í Hvalba (bygningurin til høgru), er í fyrsta lagi høvuðsveitari av trolreiðskapi til djúpvatnstrolararnar í Suðuroy*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*




*Á Fish Fair í Havn í fjør summar hevði Trolvirkið Bergið nógv vitjandi á sínum bási, og felagið gjørdi eisini avtalur við keyparar av trolreiðskapi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Fólk til hjálpar

Dan sigur, at ymiskt er gjøgnum árið, hvussu nógv tey hava at gera á virkinum, men oftast er mest at gera frá heystinum og út í mars og apríl.

-Tá ið minst er at gera, eru vit eini fýra fólk til arbeiðis, og tá ið mest er, eru vit eini átta. Vit hava eisini notið gott av skúlaungdóminum í økinum, sum er oførur at hjálpa til, tá ið nógv er at gera, og okkurt er, sum tey kunnu hjálpa okkum við.

Trolvirkið Bergið húsast í egnum hølum dygst við bryggjukantin í Hvalba.

- Hetta er eitt gamalt hús, og vit kundu ynskt okkum, at umstøðurnar vóru betur. Arbeiðshølini eru í tveimum hæddum, har hvør hæddin er umleið 18x12 fermetrar.

Í aðrari grein á hesi opnuni greiðir stjórin frá, at felagið hevur í hyggju at byggja sær nýggj, størri og meira nútímans høli til trolframleiðsluna, men skulu hesar ætlanir fremjast í verki, er ynskiligt, at vinnulívið í Hvalba og fólkið í økinum sum heild fær eitt betri og meira tíðarhóskandi tunnilssamband innan alt ov langa tíð.

### Hørð kapping

Eins og P/F Vónin segði í samrøðuni, vit høvdu við felagið í næstsíðstu viku – og P/F Føroya Trol segði í samrøðu við Sosialin í síðstu viku, ásannar stjórin á Trolvirkinum Berginum á, at kappingin á trolmarknaðinum seinastu tíðina er vorðin ógvuliga hørð.

- Eg vil siga tað soleiðis, at teir prísir, vit hava á marknaðinum í dag, als ikki eru realistiskir. Hetta eru "kunstigir" prísir, nú kappingin á marknaðinum er vorðin so hørð. Prísirnir, sum vit síggja í løtuni, kann einki virki liva við í longdini. Tí vænti eg ikki, at prísirnir koma at halda sær leingi, har teir eru.

Dan sigur seg vænta, at prísirnir fara at stabilisera seg aftur á einum hægri støði sum frá líður.

- Føroyski trolmarknaðurin er lutfalsliga lítil. Hann fer ikki at veksa, men heldur at minka frameftir, soleiðis sum niðurskurðir á hvørjum ári verða framdir í fiskidøgum. Í dag hava vit trý trolvirki, sum eg haldi vera ov nógv til verandi føroyska marknaðin.

Hinvegin, heldur stjórin, at ilt er at spáa um, hvussu gongdin verður, tí tað vísir seg, at hugurin at leggja saman er stórur.

- Tí kann væntast, at bíleggingarnar í framtíðini verða færri – og størri, og spurningurin er eisini, hvør í longdini verður knýttur at hvørjum, sigur Dan.

### Skilagóð avgerð

- Eg haldi, at avgerðin um at leggja saman við P/F Vónini fyrst í hesum árinum, soleiðis at Trolvirkið Bergið nú er ein partur av Vónin Group, var skilagóð.

Stjórin heldur tað vera umráðandi, at vit hava ein stóran føroyskan "risa" á marknaðinum – og ikki minst, nú P/F Føroya Trol hevur knýtt seg at íslendska risanum, Hampiðjan.

- Eitt slíkt samstarv tænir okkum ikki minst í felags innkeypi, soleiðis at rávøran verður bíligari, sum aftur kemur skipunum til góðar.

Dan Thomsen leggur tó dent á, at P/F Vónin og Sp/F Trolvirkið Bergið verða rikin sum tvey sjálvstøðug virkir – við hvør sínari leiðslu.

- Okkara virksemi verður stýrt úr Hvalba, leggur stjórin, sum framvegis eigur 60% av partapenninginum í Sp/F Berginum, dent á.